

# Einki serligt hjá Lundin

Jan Müller

07.05.2014 - 15:16

Oljan.fo

Hóast framleiðslan vaks, minkaði avlopið nógv hjá oljufelagnum Lundin Petroleum í fyrsta ársfjórðingi. Í roknskapinum, sum júst er almannakunngjrørdur, sæst, at avlopið fyri skatt var 30 milliónir krónur samanborið við 151 millionir krónur í fyrsta ársfjórðingi í 2013.

Tað skrivar TDN Finans.

Úrslitið er væl verri, enn marknaðurin hevði mett, tí tann metingin var upp á 10 milliónir dollarar fyri skatt.

Rakstrarinntøkurnar hjá Lundin Petroleum tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár var 235 milliónir dollarar. Tað var knappar 15 milliónir dollarar minni, enn roknað varð við, og 75 milliónir dollarar minni enn í sama tíðarskeiði í fjør.

Mynd: Ashley Heppenstall er forstjóri í Lundin Petroleum (Mynd: Thomas Haugersveen)